DAGSINS MEINING

Útseti› fólkaatkvø›u til eftir vali›

Hóast teir tríggir landsst‡risflokkarnir í farnu viku komu ásamt um eina sokalla›a or›ing til eitt slag av n‡ggjum samgonguskjali, so eru longu ábendingar um, at umrødda seming bert er ein ney›semja, um ta› í heila tiki› er nøkur semja yvirhøvur.

Forma›ur Tjó›veldisfloksins fer longu dagin eftir umrøddu semju út vi› einum skrivi, sum umbo›ini fyri hinar samgonguflokkarnar vísa frá sær. Tjó›veldisflokkurin, sum hevur fingi› púra grei› bo› frá løgmanni, um framtí›ar gongdina, roynir sjálvandi at geva út nøkur signal til veljararnar, sum skulu vísa, at hann hevur ikki slept øllum fullveldismálinum uppá fjall. Tí roynir forma›ur floksins vi› brævi sínum, i› hann kallar "Ein endalig fullveldisætlan" at vísa aftur, at talan er um stig fyri stig politik men at ta› sn‡r seg harafturímóti um eina endaliga avrigging, har vit hava fullveldi frá 2006.

Løgma›ur er skjótur at gera vart vi› seg og vísir hesum aftur. Ta› ver›ur ikki talan um at áseta eitt ávíst áramál nú. Hetta er naka›, sum landsst‡ri› skal finna fram til og í bla›num í dag ger forma›urin í Fólkaflokkinum vart vi›, at talan eins væl kann vera um fimtan ár sum tey seks árini, i› Tjó›veldisflokkurin nú roynir at stinga út í korti›.

Hvussu flokkarnir í landsst‡rinum enn keglast, so er tó greitt, at ta› er neyvan rætt at skipa fyri eini fólkaatkvø›u, sum skal seta eina n‡ggja kós út í korti› fyri øll framtí›ar landsst‡ri og føroyingar, bert eitt ár undan einum løgtingsvali. Tá líkist ta› meira eini valpolitiskari skrá. Slíkt er púra óhoyrt og vildi ikki komi› fyri nakra a›rasta›ni.

Partapolitikkur er hetta so avgjørt, so kann forma›urin Tjó›veldisfloksins látast sum at talan er um naka› anna›. Ein fólkaatkvø›a skal líkasum hjálpa landsst‡rinum burtur úr teimum trupulleikum ta› er komi› í. Hon skal leggja roykslør yvir egna ómegd. Eftir okkara tykki er ein slík fólkaatkvø›a eitt alt ov alvorligt og t‡›andi mál til bara at ver›a misbrúkt til flokspolitiska valpropagandu undan einum løgtingsvali. Fyri Tjó›veldisflokkin hevur ta› alt at siga at kunna ver›a sitandi í Tinganesi alt skei›i› út, og tí vil hann gó›taka nærum alt, sum Fólkaflokkurin krevur. Løgma›ur, sum mong hava hildi›, hevur veri› í so eftirgevandi fyri Tjó›veldisflokkinum, hevur brádliga hálsa› um og hevur gjørt Tjó›veldinum púra greitt, at tekur hann ikki undir vi› eini brei›ari semju, sum er meira í trá› vi› ta›, sum andstø›an eisini hevur ført fram, so hevur hann einki at gera í Tinganesi. Tá kundi veri› spurt, um ikki løgma›ur átti at sæ› skriftina á vegginum og skift út Tjó›veldisflokkin vi› andstø›uflokk/ar! Ta› fer helst at ver›a ney›ugt, um Tjó›veldi› fer at seta ov stór krøv til áramál.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Knút Háberg 80

Í dag ver›ur Knút Háberg í Havn 80 ár. Knút er kendur sum sparikassastjóri og sum tónleikari og sangari - serliga sum orgulspælari í Ebenezer í Havn.

Knút er havnarma›ur, føddur og uppvaksin ni›ri í Bø. Foreldur hansara vóru Poli Joensen, skómakari ætta›ur av Trøllanesi og uppvaksin á Selatra›, og Malla Petersen, dóttir Knút skómakaran, sum var ætta›ur úr Funningi.

Knút tók realprógv í Havn í 1938. Hann ætla›i sær á studentaskúla, men rá›ini vóru ikki til ta›. Hann fór tí í handilin hjá Jóannesi Lambaa at arbei›a, fyrst sum krambakallur, seinni á skrivstovuni. Hann var eitt skifti á prentsmi›juni hjá Dimmalætting, og eitt skifti undir krígnum var hann á Skála Skipasmi›ju.

Í 1942 fór Knút at starvast hjá Sorinskrivaranum sum rætsskrivari. Í 1946 kom Knút í Sparikassan, fyrst sum assistentur, seinni sum bókhaldari.

Í 1968 ver›ur Knút Háberg stjóri saman vi› Johan K. Joensen. Í 1986 ver›ur Knút fyrisitingarstjóri í Føroya Sparikassa. Hann leggur frá sær í 1989

Hevur fingi› nokk

Bygdará›sforma›urin í Hovi, Ásbjørn Berg, er ein av teimum, sum nú hava fingi› nokk av kommunalpolitikki, í hvussu so er í fyrstu syftu.

Hann hevur gjørt av ikki at stilla upp aftur til bygdarrá›svali› 21. november.

Ásbjørn Berg er eisini komin hartil, at hann hevur loyvi at s‡ta fyri at stilla upp, tí hann hevur longu siti› í bygdará›num í tríggjar setur.

Hann var› fyrstu fer› valdur í bygdará›i› í 1982 og sat til í 1986. Setuna 1986-1990 var hann ikki í bygdarrá›num, tí tá stilla›i



hann ikki upp. Men í 1990 var› hann aftur á listanum og sí›ani hevur hann veri› í bygdrará›num. Fyrstu setuna hann sat, var hann næstforma›ur í bygdarrá›num, men hesar bá›u seinastu seturnar hevur hann veri› forma›ur.

Hetta hava veri› stríggin ár í bygdará›num, tí Hov hevur veri› merkt av fráflyting. Ein stórur partur av arbei›sorkuni er farin at dragast vi› skuld, so útyvir ta›, hava rá›ini bara veri› til ta› allarmest ney›uga. Skuldin hjá Hovs Kommunu er nú um fimm milliónir og ta› svarar til hálva tri›ju álíkning.



Ein skipari fer í land

T‡sdagurin 31 oktober var seinasti arbei›sdagurin hjá Sólvit Simonson á Sandi, sum skipari umbor› á lítla strandfer›sluskipinum "Sildberanum". Heimansandsma›urin Sólvit fylti 67 ár 22. oktober í ár, og so sigur lógin, at tí› er at leggja frá sær og lata yngri koma til.

Í sinni og sál haltar Sólvit aftaná likamliga aldrinum og var ta› ikki hendan veikans lóg um pensiónsaldur, so hev›i Sólvit ivaleyst siglt fleiri ár afturat yvir um Skúvoyarfjør›. Ella sum konan tekur til. "Sólvit er so lívligur og lættur í sinni, at hann fer neyvan at ke›a seg, nú hann er vor›in pensionera›ur. "

Í skrivandi løtu stendur Sólvit og saltar skinn. Ikki er hann stórur jar›ardrottur á Sandi, men sonurin eigur eina trø› og hann hjálpir honum. Og man ikki práti› ganga lystiliga, me›an me›an ódovna›u salttirnurnar regna ni›ur yvir vátu skinnini.

Sólvit hevur siglt Skopunnarfjør› túsundtalsfer›ir sí›an hann mynstra›i umbor› á spildurn‡ggja "Sildberanum". Hetta skip, í› var› bygdur á Tvøroyri fyri 21 árum sí›an, skræddaraseyma› til teinin millum Úti í Stø› á Sandi og bygdina Skúvoy. Mangt práti› er fari› fram á hesum túrum og manga lagnuna hevur hann eygleitt. Nú er hetta skei›i› av og n‡ggjar avbjó›ingar liggja fyri framman.

Sólvit er ein virkin borgari, eisini í samfelagskjakinum. Hann situr ikki hendur í favn heima á Sandi, me›an politikkararnir st‡ra landinum av lei›. Nei, hann trívir javnan í pennin, br‡tur stiftina einar f‡ra fimm fer›ir, á›renn hvíta pappíri› litast svart vi› rámum vi›merkingum, i› koma frá hjartanum, sty›ja›ar av einum heitum kærleika til landi›, sum hann er ein virkin partur av.

je

†

Kunngjørt ver›ur fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra mó›ir, vermó›ir, omma og langomma okkara

ELIDA POULSEN

anda›ist í Eldrasamb‡linum á Skála fríggjadagin 3. november, 77 ára gomul.

Jar›arfer›in ver›ur úr Skála Kirkju í dag kl. 14.00.

Sungi› ver›ur úr sálmabókini.

Familjunnar vegna
Børnini

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Læra at taka sær av børnum vi› sorg

– Lærarar kenna til trupulleikan, tá børn syrgja. Skúlagongdin hjá hesum børnunum ver›ur merkt av sorgini, tí tey læra ikki líka væl, og tey fáa trupulleikar í sosiala lívinum á skúlanum, sigur Jancy Gaardlykke, rá›gevandi sjúkrasystur hjá Krabbameinsfelagnum

600 fólk vi› tilkn‡ti til fólkaskúlan skulu komandi tí›ina á skei›, sum skulu gera tey betur før fyri at taka sær av børnum vi› sorg

BØRN
Ey›un Klakstein

Lærarar og onnur fólk vi› tilkn‡ti til fólkaskúlan fara komandi tí›ina at leita sær gó› rá› og veglei›ing um børn, sum eru í sorg.

Ta› er Føroya Felag móti Krabbameini í samstarvi vi› Landsmi›stø›ina fyri Undirvísingarambo›, sum skipar fyri skei›unum, i› Jes Diege fra danska krabbameinsfelagnum fer at halda.

– Skei›ini ver›a fyriskipa›, tí skúlin hevur eina t‡›andi uppgávu á hesum øki, og eisini vi› tí fyri eyga, at hjálpa skúlunum at seta í verk eina skipan, sum kann fjálga um og taka sær av børnum, sum eru í sorg, siga Jancy Gaardlykke, rá›gevandi sjúkrasystur hjá Føroya Felag móti Krabbameini.

– Lærarar hava ásanna›, at teir eisini hava eina uppgávu at hjálpa børnum, sum hava sorg, tí tey hava mist foreldur, systkin ella hava veri› úti fyri onkrari sermerktari hending. Skúlin er so stórur partur av gerandisdegnum hjá barninum, at tey mugu hava ta› gott í skúlanum, sigur Jancy Gaardlykke.

Kenna trupulleikan í skúlanum

Undirtøkan fyri skei›num, sum hevur heiti› Børn, sorg og skúli er sera stórur. Heili 590 fólk vi› tilkn‡ti til fólkaskúlan fara á tey sjey skei›ini, sum byrja fríggjadagin og halda fram í eina viku.

– Lærarar kenna til trupulleikan, tá børn syrgja. Skúlagongdin hjá hesum børnunum ver›ur merkt av sorgini, tí tey læra ikki líka væl, og tey fáa trupulleikar í sosiala lívinum á skúlanum, sigur Jancy Gaardlykke.

– Ætlanin er at hesi skei›ini skulu gera lærarar betri førar fyri at takla hesar stø›urnar, so børnini koma at trívast í skúlanum.

Rágevandi sjúkrasysturin hjá Krabbameinsfelagnum vísir á, at ofta royna foreldur og avvar›andi at spara børn fyri ke›iligar hendingar vi› at halda tey uttan fyri og ikki vísa teimum kenslur, men hetta er skeiva loysnin.

– Ta› er ein misskiljing at halda, at børn skulu verjast frá tí partinum av veruleikanum, sum sn‡r seg sum at missa, sorg og dey›a. Tey hava hinvegin brúk fyri felagsskapinum vi› vaksin, og einki at gera, er skeiva loysnin, sigur Jancy Gaardlykke.

Fylgja upp

Hetta er ikki á fyrsta sinni, at Landsmi›stø›in og Krabbameinsfelagi› standa saman um at skipa fyri einum skei›i vi› evninum sorg.

Í august og september í 1998 var skei› vi› heitinum Krabbamein í Føroyum & um Børn, sorg og skúla. Skei›i› vardi í 3 dagar, og var fyri øllum skúlaheilsusystrunum, einar 20 í tali, og umlei› 25 lærarum í fólkaskúlanum.

– Undirtøkan fyri hesum skei›inum var so stór, at vit avgjørdu, at vit máttu taka evni uppaftur seinni, og ta› er ta›, sum vit gera nú, sigur Jancy Gaardlykke.

Umframt skei›ini ver›ur eisini ein almennur fyrilestur um børn og sorg í Útvarpshøllini 17. november. Ta› er Jes Diege, sum fer at halda hendan fyrilesturin.

Signera›i øru teknirø›ina

TEKNIRØ‹
Ey›un Klakstein

Leygardagin var Jógvan á Høvdanum, yngri, í SMS og signera›i n‡ggju teknirø›ina hjá sær.

Klaksvíkingurin vi› teimum sermerktu og provokerandi tekningunum hevur gjørt allar tekningar til Totalt langt úti, sum 52 sí›ur stóra teknirø›in kallast.

Talan er um ørar tekningar um kynslív, átrúna›, rúsevni og gerandislív.

Naka› av fólki kom fram vi› hjá Jógvani leygardagin, og tey fingu øll eina skrivliga heilsan frá tí argandi teknaranum.

N‡ggja teknirø›in fæst til keyps kring alt landi›, og kostar hálvthundra› krónur.



Gera n‡ggjan foreldrabólk

KRABBAMEIN
Ey›un Klakstein

Føroya Felag móti Krabbameini fer seinni í mána›inum at seta á stovn ein bólk fyri foreldur at børnum, sum hava ella hava havt krabbamein.

– Krabbamein rakar eisini børn. Hvørt ár fáa eitt ella tvey føroysk børn sta›fest krabbamein, og ta› er fyri at stu›la foreldrum at hesum børnum, at vit nú gera hendan foreldrabólkin, sigur Jancy Gaardlykke, rá›gevandi sjúkrasystur hjá Krabbameinsfelagnum.

Foreldrabólkurin skal hava samband vi› foreldrum at børnum, sum fáa sta›fest krabbamein. Ta› ver›ur mett sum stór hjálp hjá hesum foreldrum, at tey kunnu venda sær til fólk, sum hava veri› í somu stø›u.

Bólkurin fyri foreldur at børnum vi› krabbameini ver›ur stovna›ur á fundi á Hotel Hafnia 18. november klokkan 15.00. Tá fer Jes Diege frá danska krabbameinsfelagnum eisini at halda ein fyrilestur.

Lei›slan á Sernámsdeplinum fer frá

UPPSAGNIR
Ey›un Klakstein

Lei›arin og skúlalei›arin á Sernámsdeplinum hava sagt seg úr starvi.

Orsøkin er tann nógva umtalan av Sernámsdeplinum, sum hevur veri› seinastu vikurnar.

Eftir at landsst‡risma›urin í undirvísingarmálum seinasta t‡sdag seg›i vi› Sosialin, at hann fór at seta ein bólk at kanna vi›urskiftini á Sernámsdeplinum, avgjørdu lei›arnir á stovninum at siga seg úr starvi.

Marita Petersen hevur veri› lei›ari á stovninum, sí›ani hann sá dagsins ljós fyri næsta trimum árum sí›ani, og Ása Ellefsen hevur veri› skúlalei›ari.

– Eg havi ikki sagt meg úr starvi, tí eg eri bangin fyri eini kanning, men tí at eg ikki dugi at síggja nøkur útlit fyri at fáa skipa› vi›urskifti at arbei›a undir fyrstu nøgvu árini, sigur Ása Ellefsen.